Edmund Joensen:

# NÚ KEMUR ROKNINGIN FYRI FULLVELDISÁRINI



**Loysing ella samband.** *Teir báðir fólkatingslimirnir Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, og Edmund Joensen, tinglimur hjá Sambandsflokkinum, andlit til andlits í fólkatingssalinum á Christiansborg.*

MYND: JÓANNES S. HANSEN

SOSIALURIN HEVUR HITT TEIR BÁÐAR FÓLKATINGSLIMIRNAR **HØGNA HOYDAL** OG **EDMUND JOENSEN** Á CHRISTIANSBORG TIL KJAK UM LOYSING OG SAMBAND Í LJÓSINUM AV FÍGGJARKREPPUNI.

og vit høvdu sum heild ein sterkan búskap, sum er orsøkin til, at vit ikki eru farin á heysin í dag. Orsøkin til ringu støðuna nú er ein ábyrgdarleysur fíggjarpolitikkur síðani 2004. ABC-flokkarnir hava uppbrúkt uppsparingina og givið skattalættar, sum hava kostað landskassanum einar 400 milliónir, og sum ovurhitaði ein alt ov heitan búskap.

**Edmund**: Nei nei, í dag rinda vit rokningina fyri ein ábyrgdarleysan loysingarpolitikk. Fullveldissamgongan framdi yvirtøkur og skerdi blokkin fyri knappar 400 milliónir í reinum fruminntøkum til landskassan, og samstundis hækkaðu rakstrarútreiðslurnar á fíggjarlógini við 200 milliónum um árið. Tað skapti eitt gap, sum vit enn stríðast við, hóast eg viðurkenni, at ABC-samgongan ikki hevur verið nóg stinn at tálma útreiðslunum. Í dag kunnu vit prísa okkum lukkulig fyri, at CHE-samgongan ikki skar blokkin við 117 milliónum, og ikki minst at hon ikki yvirtók fíggjarkervið, tí so høvdu vit ikki fingið lut í bankapakkunum, og so høvdu vit endað sum íslendingar.

**Høgni**: Viðvíkjandi fíggjarkervinum, so hevur Tjóðveldi ongantíð ætlað sær egið gjaldoyra. Eitt føroyskt fíggjareftirlit snýr seg einans um at fáa lóggávuábyrgdina heim til Føroya, samstundis sum fíggjarkervið sjálvandi skal vera partur av eini størri eind við eksternum eftirliti. Tjóðveldi hevur støðugt ávarað ímóti íslendska fíggjarpolitikkinum seinnu árini. Og hvussu hevur danska fíggjareftirlitið tað í dag? Hvussu klárar danska bankakervið seg? Vánaligt! 40 danskir bankar eru farnir á heysin. Er tað nøkur trygd? Og viðvíkjandi tíðarskeiðinum frá 1998 til 2004, so er tað rætt, at útreiðslurnar hækkaðu, men Edmund gloymir, at vit arvaðu eina milliardaskuld, sum vit rindaðu aftur.

**Edmund**: Tit komu til eitt sanerað samfelag í 1998 ...

**Høgni**: Eitt sanerað samfelag? Almennu Føroyar skyldaðu sjey milliardir!

**Edmund**: Ja, men samfelagið var so væl fyri. Landskassin hevði 500 milliónir í yvirskoti í 1998, og tað bara vaks ...

**Høgni**: Ja, og vit spardu eisini tríggjar milliardir upp, sum ABC-flokkarnir nú hava oyðslað burtur.

**Edmund**: Tann uppsparingin hevði verið nógv størri, um tit ikki skóru blokkin í vitloysi.

**Høgni, Tjóðveldi hevur meldað út, at blokkurin á 615 milliónir skal vera burtur í 2014. Hvussu ólukkan skal hetta bera til, tá undirskotið á fíggjarlógini helst fer at tátta í milliardina?**

**Høgni**: Orsøkin til stóru búskaparligu sveiggini er, at vit liva í eini politiskari skipan við einum blokki, sum flytur ábyrgdina frá okkum sjálvum og til onkran annan. Í staðin fyri at halda fram við positivu gongdini frá 2004, so hava ABC-flokkarnir ført okkum út í eitt undirskot uppá eina milliard seinastu fimm árini.

**Og ein global fíggjarkreppa!**

**Høgni**: Ja, og hvat hevur skapt fíggjarkreppuna? Ein neoliberal hugsjón, har pengar verða sprændir inn í skipanina uttan reelt virði aftanfyri. Og tað er júst tað sama við blokkinum. Vit byggja eitt samfelag við pengum uttan nakað virðisskapandi virksemi aftanfyri.

**Men blokkurin kann ikki samanberast við tær mekanismur, sum hava koyrt heimin á heysin. Blokkurin er ein stabil inntøka hjá landskassanum, sum eingin fer á húsagang av?**

**Høgni**: Hvør er munurin? Hvussu nógv hava Føroyar ikki rindað aftur í skuld, tá vit eru farin á heysin orsakað av eini skipan, sum framleiðir ábyrgdarloysi?

▶